# BEAT THE MATERIAL

**»Hetta snýr seg helst onkursvegna um postmodernismu og dekonstruktión, men beint nú eri eg mest áhugaður í tí tøkniliga, í tí, eg kann fáa burtur úr sjálvum steininum«, sigur danski listamaðurin Claus Carstensen millum annað í áhugaverdum viðtali, sum avdúkar ein ovurhonds aktivan, forvitnan og harav sera vitandi listamann, ið eisini kennir til føroysk viðurskifti**



BEAT THE MATERIAL

## Listprofilur



**Kinna Poulsen**

### Áhugi fyri týdningum

Tú gerst alt fyri eitt varug við hansara serliga ans fyri orðum og teirra týdningum, eins og tað á øllum brøgdum sæst, at hann er meira enn nøgdur við at viðtalið er ætlað einum blaði við so margháttligum heiti sum SOSIAL-URIN. Víst hevur maðurin humoristiskan sans, men googlar tú hansara navn og "urin" koma ikki so fá úrslit, ið benda á, at listamaðurin í fleiri av sínum konseptuellu, ella hugskotsgrundaðu verkum sum t.d. "Æterlegeme" (1986) hevur brúkt land sum part av tilfarinum. "Æterlegeme" verður roknað sum eitt av høvuðsverkunum innan danska list og er í ogn hjá Statens Museum for Kunst, har tað nýliga var kjakevnið á evnisviku um samtíðarlist og trupulleikan við at halda list við líka, sum upprunaliga var ætlað at forfarast. Listamaðurin tykist blíður og prátingarsamur og tosar um Steffan Danielsen og kensluna av ómetaligum einsemi í myndum hansara, meðan undirritaða finglast heldur fjálturstungin við bandupptakaran, sum einki band er í. Og meðan Jan finnur eitt band, práta vit víðari, eg og listamaðurin, ið tykist hava eina ørgrynnu av orðum til taks og sum hugsar og tosar skjótt og nógv og sum ikki hevur fyri neyðini at verða settur í gongd við meira enn tí vandaleysa byrjanarspurninginum. Hann er væl lærdur og hevur umframt akademiútbúgvingina, eisini lisið bókmentafrøði og teknfrøði (semiotik). Tá hann verður skýrdur sum størsta flogvitið í sínum ættarliðið, ella sum danir siga "sin generations største æggehoved" verður altso ikki bert sipað til frísýruna hjá myndlistamanninum, yrkjaranum, kuratorinum v.m., Claus Carstensen, ið bert 36 ára gamal gjørdist professari á kunstakademinum í Keypmannahavn, har hann dvaldist árini 1993-2002. Henda kavahvíta seinnapartin seint í oktober er hann staddur í Grafiska Verkstaðnum í Gundadali í Havn, her tey bæði Jan Andersson og Fríða Brekku eru í ferð við at skipa tað seinasta av avrikinum í hesum arbeiðsumfarinum, nú bæði veggir og borð eru á tremur av steinprentum hjá Claus Carstensen, ið øll eru í háformati. Summi teirra eru plakatkend við litfagrari grund og greiðari, svartari átekning, meðan onnur tykjast meira klassiskt grafisk. Hesi sýnast um somu tíð bæði grovari og fínligari, vovin í svørtum, hvítum og einum sonnum ríkidømi av gráum tónum.

### Deyðatilvit

Eg biði fyrst Claus Carstensen greiða frá hvat tað er, hann hevur gjørt á Grafiska Verkstaði Føroya: Ein øgilig framleiðslumegi hevur valdað teir níggju dagarnar, hann í hesum umfarinum hevur arbeitt her, greiðir hann frá og heldur fram: "Vit hava arbeitt frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi og fingið eitt sera gott arbeiðslag so at vit nú at enda hava heili tólv liðug prent við øllum uppløgunum liðugt prentaðum. Eg byrjaði við at gera nøkur irisprent, har tríggir litir vórðu prentaðir í senn. Hetta gongur skjótari enn tá ein litur verður prentaður í senn, tí á henda hátt er tað nóg mikið bert at hava tvey prentumfør; eitt við litum og so tað svarta. Tá so steinurin at enda stóð og bara skuldi vaskast reinur, gjørdi eg eitt fuck-up á steinin, har tú í grundini oyðileggur hann og síðan tekur eitt prent honum. Á henda hátt fært tú tvey sløg av prentum burtur úr tí eina steininum; eitt sum er koloristiskt og plakatkent og meira reint og vakurt og so eitt meira skitið og rátt avbrigdi.

Innihaldslig snúgva hesi prent seg um eina av Duino-elegiunum há Rainer Maria Rilke, ið m.a orðar tað soleiðis: "Mit allen Augen sieht die Kreatur / das Offene". Tað snýr seg um munin millum deyðatilvitið hjá djórum og menniskjum, har djór við tað, at tey ikki verða hildin at hava tilvit um, at lívið er avmarkað, liva í einum opnari lendi enn menniskjað, sum altíð hevur hetta framman fyri sær, at lívið hevur ein enda. Ein avmarking, sum jú hevur ótrúliga stóran týdning fyri okkara lívsáskoðan og fyri alla okkara mentanarligu uppbýting av tíð og rúmi. Myndevnið av djórinum og menniskjanum havi eg brúkt áður í málningum og nú havi eg tikið tað við her. Sostatt er talan ikki um skitsur, men um eitt slag av eftirburði, ella avrunding av nøkrum, sum hevur verið".

### Verkini skuldu sodnast

*Hvat er fagurfrøðiliga sjónarmiðið aftan fyri tílíkar myndir sum hesar? Tær sýnast í grundini rættiliga dekorativar við vøkrum litum og mynstrum..*

"Jú, tað kanst tú gott siga, men samstundis er tað ein sannroynd, at mínar myndir eru øgiliga ringar at selja. Ein orsøk til tað er kanska, at hetta er eitt slag av jóturdýrs-estetikki, sum eg brúki og sum krevur, at verkini skulu meltast og sodnast nakrar ferðir, áðrenn tú fært eina fatan av innihaldinum. Fólk hava helst kenslu av, at tað er meira í teimum, enn tey beinleiðis síggja og skilja og tað er eisini rætt. Hetta er ikki klassisk minimalisma av tí slagnum: "what you see is what you get", men næstan tað øvugta: "what you don´t get is what you see". Litavalið er í grundini tilvildarligt. Í staðin fyri eitt litkort brúktu vit bøkurnar, har Jan hevur noterað litirnar, sum tey undanfarnu listafólkini, sum hava arbeitt á verkstaðnum, hava brúkt. Tað vil siga, at tann eina myndin t.d. er ein Hansina Iversen osfr. Hatta slagið av konstruktivari tilvild dámar mær at brúka".

*Tilgongdin í tínum verkum er hugskotsgrundað og verkini innihalda ofta figurativar staklutir*



Listamaðurin skoðar irisprent

Sosialurin